# Náttin hugsar sítt og

## Orð til aftankvirruna í Havnar kirkju seinasta fríggjakvøld

Theodor E. D. Olsen

Fyrst vil eg bjóða tykkum at vera vælkomin higar í kvøld til aftankvirru í Havnar kirkju, kvøldið fyri trettandu.

Tí tað er kanska ikki sørt, at vit menniskju hava brúk fyri at steðga á við hvørt.

At geva okkum tíð. At geva okkum tíð til frið og til kvirru.

At geva sær tíð til frið um kvøldið og náttina í hesi tíð, nú tað er so myrkt uttanfyri, er kanska eisini nakað heilt serligt.

Í bókini "Ferð mín til Jorsala" hjá prestinum Kristian Osvald Viderø, lesa vit hetta brotið, har hann skrivar, hvussu góð náttin kann vera:

*"...náttin er fjálg og mild; hon er tigandi, spyr um einki, hvørki um óreinmentar ætlanir ella óskilvísar tilgangir. Hon er eins og móðir við sítt sjúka barn, tekur tað blíðan og varliga inn at sær - - - tekur tað soleiðis sum tað er; hon spyr ikki um "hvær" og "hví" og "hvussu".*

*Alt tað, sum dagurin havnar og rekur frá sær, tað tekur náttin í fadm (...).*

*Hon setur ongar dómstólar og dømir ongan; hon mælir og metir ikki, heldur javnar hon alt út; tess vegna leitar til hennar alt tað, sum ikki má standa tey mát, sum dagurin setur og sum ikki er ment at halda tær lógir, sum hann skipar; fjálgandi breiðir hon sínar móðurligu armar út um tað alt samalt og tekur tað tigandi og líknsamliga inn at sær.*

*Men hon hugsar sítt og tað djúpt og hómar með sínum blindu eygum fyrir aftan alt hetta, størri ætlanir og hærri tilgangir enn dagin grunar".*



Sosialurin

Við øðrum orðum sær Viderø náttina sum eitt stað ella frípláss, har hann koma í friði við sínum hugsanum og byrðum, tí náttin koyrir ongan burtur frá sær.

Í morgin er sum sagt trettandi. Trettandi verður hildin til minnis um vísmenninar úr Eysturlondum, sum komu at tilbiðja Jesusbarnið og geva tí gávur, og er hetta eisini prædikuteksturin til í morgin. Trettandi var í fornkirkjuni hildin sum føðingardagur hjá Jesusbarninum, og verður tað enn í summum kirkjum eystanfyri.

Men longu í 4. øld varð semja um, at halda føðingardagin hjá Jesusi 25. desember, og tí verður trettandi her hjá okkum nú hildin til minnis um vísmenninar, sum komu at geva Jesusbarninum gávur.

Tað er ikki nógv vit vita um hesar vísmenninar. Ja, so lítið, at tað við tíðini eru lagdar fleiri søgur ella sagnir aftrat hesi hugtakandi frásøgn úr Bíbliuni.

T.d. stendur ikki í Bíbliuni, at vísmenninir vóru tríggir í tali, ella hvussu teir itu, men kirkjulærarin Origines, sum varð føddur umleið ár 185, skrivar, at tað vóru tríggir vísmenn. Seinni í tíðini verða teir kallaðir kongar, og fáa nøvnini Kaspar (ella Jaspur), Melkir og Baltsar.

Men so kunnu vit spyrja, hví alt hetta er komið aftrat við tíðini? Hví er alt hetta lagt afturat bíbliusøguni?

Svarið er helst, at tað er tí at hetta er ein fantastisk søga - at tríggir skilamenn - tríggir vaksnir menn - koma heilt úr Eysturlondum fyri at síggja ein nýføðing, sum teir halda vera kong.

Allarhelst hava vísmenninir - líkasum Viderø - verið hugtiknir av náttini, tí vit lesa, at teir fylgdu eini stjørnu, og stjørnur síggjast jú best um náttina.

Stjørnan vísti teimum á staðið, har Jesusbarnið lá, og tær fyrstu jólagávurnar vórðu givnar.

Ein av søgunum, sum eisini er løgd aftrat frásøgnini í Bíbliuni um vísmenninar, er, at teir vóru ættaðir frá teimum trimum synunum hjá Nóa, sum fóru í hvør sína ætt eftir syndaflóðina, og tí kann boðskapurin lesast sum, at hesir tríggir vísmenninir umboða øll fólkasløg, og tí er gleðiboðskapurin til øll sløg av fólki.

Líka mikið hvør tú ert, so ber til at gera sum hesir vísmenninir: at koma til Jesusbarnið á nátt og boyggja knøini og koma til hansara við allari sínari sorg og gleði.

Um vit lesa eitt sindur í Nýggja testamenti, so er tað serliga eitt fólkaslag, sum ikki verður so pent umtalað.

Hetta eru fariseararnir. Teir hava kanska ikki verið so galnir kortini, men vita um teir, at teir gingu høgt upp í at halda lógina í Gamla testamenti til minstu smálutir.

Men hóast teir vóru farisearar, so vóru teir ikki verri enn so, enn at Jesus vildi sita til borðs saman við teimum – enntá um náttina.

Ein av farisearunum æt Nikodemus. Hann var ráðharri hjá jødunum, og vit lesa í Nýggja testamenti, at hann ta einu náttina valdi at vitja Jesus. Hví hann kom um náttina, kunnu vit bara gita okkum til, men eins og hjá Viderø, so kom hendan vitjanin á nátt at vera eitt heilt serligt upplivilsi fyri hann.

Hendan náttin hjá Nikodemusi gav nevniliga svar upp á so nógvar spurningar, sum dagurin ikki gav.

Tí Nikodemus kom til Jesus